## DAGSINS MEINING

# Leiklutur ST í framtíðini

Í gjár 24. oktober flaggaði merkið á Tinghúsvøllinum fyri fyrstu ferð henda dag. Landsstýrið hevur gjørt av, at tað skal flaggast ST dagin. Eisini verður nú flaggað 8. mars, sum er altjóða kvinnudagur.

Hví halda og flagga ST dagin vil onkur spyrja! ST átti at verið tað nærmasta vit koma friði og demokratii, tí átti hetta at verið so sjálvsagt. At ST tó ikki hevur megnað at fremja allar tær uppgávur, sum mong av okkum halda tað átti, er so nakað vit eiga at hugsa nærri um. Hóast góðar intentiónir, so vil talan eisini verða um vald og styrki. Tí er leikluturin hjá ST í fleiri málum avmarkaður. Hinvegin eiga vit ikki at gloyma, at á nógvum økjum ger ST eitt ómetaliga stórt og týdningarmikið arbeiði, og tað kom tí heldur ikki óvart á nakran, tá og tess aðalskrivari fingu Nobelvirðislønina herfyri.

Vit hava brúk fyri einum breiðum orðaskifti um leiklutin hjá ST í framtíðar globala samfelagnum. Í hvønn mun ber til at gera henda felagsskap til ein púra óheftan stovn, sum kann virka ímóti ófrælsi, ódemokratii, rasismu, religiónsfanatismu, terrorvirksemi og samtíðis virka fyri at betra um livikorini hjá sjúkum og fátækum, ja tryggja teimum minni mentu javnbjóðis lut í jarðarinnan ríkidømi.

Ein av stóru og álvarsligu uppgávunum hjá ST í byrjanini av hesi nýggju øldini er at byggja brúgv millum ríka og fátæka partin av heiminum og tryggja, at virðini og tilfeingið, ið vit bert hava fingið til láns frá okkara eftirkomarum, verða rætt troytt og býtt. Størsta hóttanin móti mannaættini er ikki kjarnorkuvápn ella biologiskt vápn í sær sjálvum. Tað er vaksandi kluftin millum rík og fátæk. Og her hava vit í vesturheiminum eina stóra ábyrgd. Mótmælisgongurnar í sambandi við fundirnar hjá heimsins handilssamgongum, heimsbanka ol. er nakað vit eiga at taka í álvara. Hetta eru ikki bara ófriðakroppar og anarkistar, ið vilja gera um seg. Vit mugu fokusera meira á, hvat henda nýggja "bylgjan" í veruleikan ger vart við. Skulu vit, sum longu hava nokk, sleppa at tvíhalda um okkara fyrimunir og atgongd til ríkidømi? Hvønn rætt hava vit at tvíhalda um skuldina frá teimum tilafturkomnu londunum, sum vit í mongum førum hava mergsogið? Hvørjar avleiðingar fáa risastóru multinationalu fyritøkur fyri okkum øll. Hví skal alt privatisera osfr.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Serføroyskari at skriva Evropa og Avstralia?

**Ólavur Hátún**



Kann ikki siga annað, enn at tað fellur mær fyri bróstið, at fólk eru farin at skriva omanfyrinevndu heimspartar við v, sum allur heimurin við somu bókstavum sum vit skriva við u. Týskarar t.d. frambera Europa sum »oyropa«, tí á teirra máli verður eu framborið sum okkara oy, og enski framburðurin við »jú« endurgevur eisini eitt eu. Í Australia vísir framburðurin av teirra heimsparti, at talan er um skrivað a***u***, og hví skulu vit, sum í okkara egna skriftmáli so fegin vilja leita aftur til upprunar, soleiðis royna at sermerkja okkum við einum a***v***, tá ongin orsøk er til tað? Gagn ger tað onki, heldur skurrar tað í oyrum at hoyra okkarar »spikarar« nú meira enn fyrr bíta seg í undirvørrina, tá teir lesa Ev-ropa og Av-stralia. Og nú vit eru við framburð í okkara fjølmiðlum, so skurrar tað ikki minni at hoyra oynna Mallorca framborna sum Malorska. Spaniólar skriva her ll, men siga j, Majorka, og tí kundu vit her loyvt okkum ein føroyska stavseting við j, so sum eisini bretar hava tað, tí í oyggjarnavninum liggur upprunaorðið major, tann størra oyggin, samanborið við tað minnu, minor, sum eitur Menorca.

At vit í seinni árum hava fingið forn føroysk geografisk heiti sum t.d. Ermasund, Eystrasalt, Fjón og Sæland aftur í nýtslu er at frøast um. Men at royna at nýskapa eitt føroyskt landafrøðiligt mál við t.d. at skriva Liktinstein fyri Lichtenstein og Kili fyri Chile haldi eg vera at vaða longur út, enn ynskiligt er. Tí hvar skulu vit enda? Fara vit kanska í bókmentum at tosa um Sjeykspir og tað, sum Gøti hevur skrivað, og at spæla verk eftir Sjopeng og Edvard Grik?

Nei, ikki ynski eg at gera nakað til láturs, sum so góð fólk vilja fremja okkara máli at gagni; men eg vil halda, at vit heldur enn at royna at ljóðskriva mál hjá øðrum, áttu at tikið verulig stig til at endurskoða okkara egna skriftmál, so at tað her fæst betri samsvar millum tað talaða og tað skrivaða málið.

# Føroyska undirgrundin í 65 milliónir ár

*Morten Sparre Andersen, gestaprofessari*



TÍÐINDASKRIV

ALMENNUR FYRILESTUR verður á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum týsdagin 30. oktober 2001 kl. 15.00.

Morten Sparre Andersen, gestaprofessari í jarðalisfrøði á Fróðskaparsetrinum, heldur starvstøkufyrilestur, ið hann kallar: Færøplatformen gennem 65 millioner år.

Morten Sparre Andersen er professari í jarðalisfrøði; hann er serfrøðingur í jarðfrøðini við Føroyar og Rockall økið. Hann er nýliga settur í starv sum gestaprofessari á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Í fyrilestrinum fer Morten Sparre Andersen at greiða frá týðandi tilburðum á Føroyapallinum tey seinastu 65 milliónir árini, soleiðis sum tey eru til skjals í granskingini tey seinastu árini. Hann fer at viðgera nøkur av granskingar- og kanningarháttaløgunum, og at enda fer hann at nema við framtíðarperspektivini hjá jarðfrøðiligu og jarðalisfrøðiligu granskingini á Føroyapallinum.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Andstøðan lopin fram av

**Jógvan við Keldu**
*limur Fólkafloksins í Uttanlandsnevndini*



Tað er í andstøðu ein persónur vísur kvalitiet, ella hvør veruligur dugur er í honum.

Í Føroyum hevur altíð verið hildið ómansligt bert at liggja í eini afturundirgerð og bíða eftir at persónar skulu gera okkurt skeivt ella taka onkra ivasama avgerð, fyri síðani at taka hetta upp.

Nakrir politikarar eru føddir til at skapa meðan aðrir liva av at finnast at.

Onkur hevur sagt, at "tað er í andstøðu ein persónur vísur kvalitet, ella hvør veruligur dugur er í honum".

Nú henda øsing, av eitt nú Jóannesi Ejdesgaard formanni javnaðarfloksins og Edmundi Joensen fyrrverandi løgmanni og fyrrverandi formanni sambandsfloksins viðvíkjandi brævi frá danska uttanríkisráðnum dagfest 4. í.h. og brævaskifti, "um loyvi at flúgva yvir føroyskum landaøki" er farin fram, kundi eg hugsa mær, at fleiri av hugsandi sambands- og javnaðarfólkum eru eitt sindur hám av teimum.

Ein politikari sum liggur í afturundirgerðini og bíðar eftir at gera seg inn á persónin, heldur enn at fremja málið, verður sjáldan nøkur ogn fyri skapandi politiska systemið.

**Freistín ómetaliga stutt**

Fyri tað fyrsta, er hetta helst fyrstu ferð, at Føroyar yvirhøvur eru eftirspurdir, og bidnir um at geva eina tilsøgn um loyvi at flúgva yvir føroyskum landaøki. Hetta er danskt mál.

Í aðru syftu, er tað heldur ikki so lætt hjá politikarum at vita, hvussu fram skal farast í eini so knappari vending, tí hetta er óvanligt, at vit í einum so stórum máli sum hesum, bert høvdu 21 tímar at umráða okkum í.

At Heðin Mortensen — sum einasti limur í nevndini - sýtti at møta og bað um at fáa 18 tímar til at umhugsa seg í, tað hevur hann fullar rætt til, tí hann ikki visti, hvussu hann skuldi bera seg at, er kanska heldur einki at siga hann ringan fyri. - Hinvegin mugu vit minnast til, at amerikumenn høvdu ikki tíð til at bíða, inntil Heðin Mortensen limur í Uttanlandsnevndini í Føroyum einaferð var útskavaður, tí tað kundi hent, at afganar longu vóru á USA, áðrenn Føroyar høvdu sent danska uttanríkismáláraðnum svarið.

Tí var rætt av løgmanni at svara hesum brævi, tí svarið skuldi verða Uttanríkisráðnum í hendi seinast 5. oktober kl. 13.00 danska tíð. — Formaðurin í Uttanlandsnevndini Hergeir Nielsen royndi av ærligum huga — og ikki sum andstøðan ger tað til "eina lítið umhugsaða roynd" - at fáa fund í lag. Lat meg leggja afturat, at eg var í diamantbrúdleypi og hevði sligið fartelefonina frá, tí eg hevði nógv við hesa hátíðarløtuna at gera. Visti heldur ikki av, at USA og Afganistan høvdu brúk fyri mær sum uttanlandsnevndarlimi í einari so knappari nevnd.

**Hevði væntað hægri flog**

Øll sum hava fylgt orðaskiftinum í fjølmiðlunum duga at síggja, at Jóannes Ejdesgaard og Edmund Joensen í hesum føri bert eru úti eftir løgmanni og formanninum í Uttanlandsnevdnini og eru tí lopnir fram av.

Vit hava eisini sæð, at Jóannes Ejdesgaard ferð eftir ferð hevur endurtikið floskulin at, " her standa vit standa øksl við øksl", meðan virðingin fyri Føroya løgmanni og formanninum í Uttanlandsnevndini skortar í stórum, og tað ger hon eisini eftir hesum at døma hjá Edmundi Joensen. — Av fyrrverandi landsstýrismanni og fyrrverandi løgmanni hevði eg vætnað hægri flog.

Eg havi sæð onkustaðni onkran taka soleiðis til: "Sigur ein politikari, at vit eru í sama báti, ella "standa øksl við øksl" ansað tá væl eftir, tá ætlar hann at verða skipari".

**Eg kravdi nærri frágreiðing frá løgmanni**

Lat meg tí gera greitt, at eg ynskti fyri tað fyrsta at fáa løgmann á fund, so hann kundi verja síni sjónarmið í hesum máli, meðan andstøðulimir spurdu, hvat tað skuldi til. - Eg havi eisini biðið um at fingið málið aftur á dagsskrá til komandi týsdag, so vit kunnu fáa málið avgreitt. - Eisini havi eg kravt á fundi at faa at vita frá løgmanni, nær danska Uttanríkisráðið gav boðini til donsku Udenrigs Politisk Nævn, og um tey fingu boðini áðrenn vit fingu tey.

Annað er so tað, sum eg eisini havi borið uppá mál, at Uttanlandsnevndin og Føroya løgmaður eiga at tosa nærri um tílík viðurskifti, so tílíkt sjáldan ella helst ongantíð kemur fyri aftur.

Skeivleikar hava av og á verið gjørdir, helst eisini hjá Jóannese Ejdesgaard og Edmundi Joensen, teir verða gjørdir í dag, og teir koma eisini í framtíðini at eiga sín part av politiska lívinum. Hinvegin eiga vit at minka um skeivleikarnar.

At andstøðulimir eru lopnir fram av í hesum máli, er eingin ivi um hjá teimum flestu.

# Fíggjarlógaruppskot landsstýrisins fyri 2002

**Jákup Lamhauge**



Fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrissamgonguni fyri ár 2002 hevur sum kunnugt verið til fyrstu viðgerð í løgtinginum – og aftaná tríggjar dagar langt orðaskifti er málið nú til viðgerðar í fíggjarnevndini.

Við framløguni av uppskotinum frá landsstýrinum fylgdi eisini ein bóklingur – ein sokallað frágreiðing um rikna politikkin og málsetningin hjá samgonguni fyri samgonguskeiðið, sum nú gongur móti endanum.

**Í fororðunum sigur landsstýrið m.a.:**

At høvuðsstevnumiðið hjá samgonguni er føroyskt fullveldi.

At fíggjarlógaruppskotið fyri 2002 er størsta búskaparpolitiska stigið fram ímóti føroyskum fullveldi og sjálvberandi føroyskum búskapi.

At heildarveitingin úr Danmark verður minkað 365 mill. kr. og verður einvegis inntøkuflytingin úr Danmark nú nógv minni partur av inntøkugrundarlagi landskassans.

At hetta samstundis er ein avbjóðing búskaparpolitiskt.

At hetta fer framhaldandi at seta krøv til ein skynsaman búskaparpolitikk.

Sí talvu!

Sum sæst av omanfyri nevnda yvirliti, so roknar landsstýrið við einum avlopi uppá 18 mill. kr. komandi ár – men havast má í huga, at onki tal er avsett til meirútreiðslur, sum altíð koma fyri í einum ári – t.d. í 2001 verða eykajáttanir uppá yvir 100 mill. kr. til ymisk málsøki, har upprunaupphæddin hevur verið ov lág – onki er at ivast í at hendan upphædd verður eins stór komandi ár og helst gott og væl tað.

**Samgonguflokkar krevja hægri játtan**

Umframt hetta, so kom fram undir viðgerðini av fíggjarlógini, at fólkaflokkurin kravdi skattalætta fyri 30 mill. kr. og sjálvstýrisflokkurin kravdi meirjáttan til pensiónir uppá 30 mill. kr.

**Yvirskotið verður nú til stórt hall**

Samanumtikið, so verður ikki talan um avlop uppá 18 mill. kr., men í staðin verður talan um eitt hall uppá uml. 150 mill. kr.

**Størsta búskaparpolitiska tiltak samgongunar:**

Í bóklinginum sigur landsstýrið, at minkaða heildarveitingin er størsta búskaparpolitiska tiltak fram ímóti føroyskum fullveldi. Hetta fer framhaldandi at seta krøv til útreiðslustýring landskassans næstu árini.

Sum kunnugt, so hava samgonguflokkarnir samtykt at yvirtaka fíggjarligu ábyrgdina frá dønum av ávísum málsøkjum fyri tilsamans uml. 400 mill. kr. – og úrslitið av hesum er nú heilt greitt – stórt hall á fíggjarlógini komandi ár.

Føroya fólk stendur nú spyrjandi hvat fer at henda – fer landsstýrið at skera burtur av játtanini til heilsuverkið, skúlaverkið ella almannaverkið fyri at fáa javnvág á fíggjarlógina, ella verður talan um hækkað skatta- og avgjaldstrýst?

**Útreiðslustýring landskassans**

Um útreiðslurnar annars sigur landsstýrið, at stórt trýst hevur verið á landskassans seinastu árini.

Jú, sjón er fyri søgn – árið undan at henda samgonga tók við í Tinganesi – nevniliga í 1997 vóru útreiðslur landskassans 2.663 mill. kr., nú fýra ár seinni eru útreiðslurnar vaksnar til 3.358 mill. kr. – ein vøkstur uppá uml. 700 mill. kr. – og her skal havast í huga, at rentuútreiðslurnar av lánum í 1997 vóru 336 mill. kr., meðan tær í 2002 verða mettar til 89 mill. kr.

Ein kann av røttum spyrja um talan hevur verið um nakra útreiðslustýring seinastu fýra árini undan fullveldissamgonguni.

**Um høvuðstølini á fíggjarlógaruppskotinum sigur bóklingurin m.a.:**

| | |
|---|---|
| **Inntøkur:** | |
| Skattainntøkur | 1.552 mill. kr. |
| Avgjøld og tollur | 1.280 mill. kr. |
| Ymsar inntøkur | 43 mill. kr. |
| Heildarveiting úr Danmark | 642 mill. kr. |
| Inntøkur tilsamans | 3.517 mill. kr. |
| **Útreiðslur:** | |
| Rakstrarútreiðslur | 3.037 mill. kr. |
| Løguútreiðslur | 232 mill. kr. |
| Rentuútreiðslur | 89 mill. kr. |
| Avdráttir | 141 mill. kr. |
| Útreiðslur tilsamans | 3.499 mill. kr. |
| Avlop | 18 mill. kr. |